# Nógvir dystir hjá kvinnunum

**Ikki færri enn fýra dystir eru á skránni í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Bæði Dráttur og TB skulu í eldin tvær ferðir um vikuskiftið. Leygardagin skulu tvørakvinnur norður um Suðuroyarfjørð, tá ið tær skulu dystast við KÍF í Hoyvíkshøllini. Um ikki TB fær fulla úrttøku burtur úr hesum dystinum, hevði tað verið ein sensatión.

## Toppur og botnur

Hin dysturin, sum er á skránni leygardagin, verður leiktur á Giljanesi, har heimaliðið Dráttur fær vitjan av ÍF. Liðini liggja bæði tvey í miðjuni av kappingini, men Dráttur verður helst mett at verða eina tonn sterkari enn ÍF.
Sunnudagin verður eisini ein dystur í Vágum, og tá er tað toppur og botnur, ið hittast í Sørvági. Botnliðið SÍ hevur enn einki stig, meðan Mjølnir, sum kemur á vitjan, er oddalið við 13 stigum.
Dysturin millum kvinnurnar hjá SÍ og Mjølnir fer tí neyvan at verða eins spennandi, sum mansdysturin millum somu feløg, ið verður leiktur beint aftaná.

Hinvegin so beit SÍ veruliga frá sær, tá ið TB vitjaði í Sørvági herfyri, og neyðugt var við fimm settum, áðrenn TB fekk stigini við sær.
Seinasti dysturin hjá kvinnunum um vikuskiftið er í Trongisvági, har TB fær vitjan av Drátti. Talan verður kanska um ein spennandi dyst, tí Dráttur kann veruliga bíta frá sær, um tær hava ein góðan dag, men TB má metast sum favorittar.

P/F ALMA
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA
Munters
THE HUMIDITY EXPERT
Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondensrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.
Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo



# Toppdystur í Sørvági

**Lagt er upp til eitt ordans brak í Sørvági sunnudagin, tá ið tey bæði fremstu liðini í meistaradeildini hjá monnum í flogbólti bresta saman**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Um sørvingar sunnudagin megna at basa klaksvíkingum í Sørvági, hava teir tikið eitt megnar stig á leiðini til føroyameistaraheitið í mansflogbólti 2005. Gamaní hava klaksvíkingar oddasessin í løtuni við einum stigi meira enn SÍ, men Mjølnir hevur eisini leikt ein dyst meira. Verður hugt at settmuninum, stendur SÍ eisini betur har.

## Hava vunnið hvør sín dyst

Dysturin í Sørvági sunnudagin verður tann triði millum hesi bæði lið í hesum kappingarárinum. Í fyrsta dystinum í kappingini hittust liðini í KÍ-høllini miðskeiðis í oktober mánað, og tá vunnu klaksvíkingar 3-1.
Men síðst í november mánað hittust liðini í Sørvági, og tá var tað SÍ, sum var omaná og vann dystin 3-1.
Uttan iva fara sørvingar at møta talsterkir til dystin sunnudagin, og spurningurin er, um ikki eisini onkrir klaksvíkingar fara at leggja leiðina vestur í Vágar.
Umframt at verða ein spennandi oddadystur, er dysturin millum SÍ og Mjølnir eisini ein generalprøvi upp á steypafinaluna millum júst hesi bæði, sum verður spæld leygardagin 12. februar í høllini á Hálsi.
Hin dysturin í meistaradeildini hjá monnum hetta vikuskifti verður í Havn sunnudagin, tá ið Fleyr fær vitjan av ÍF. Fleyr hevur havt eitt væl betur kappingarár í ár í mun til í fjør, og teir liggja í løtuni á bronsuplássinum. ÍF, sum í fjør á seinasta leikdegnum spældi um FM-heitið, hevur als ikki somu styrki í ár, og tað er ikki væntandi, at teir fáa koppað havnarliðnum sunnudagin.

Finn gullið í tíni egnu fyritøku



**Nýskapan er lykilin til vøkstur. Ofta vísir tað seg, at tey góðu hugskotini eru at finna í fyritøkuni sjálvari. Hugin hjálpir tær at grava tey góðu hugskotini um nýskapan fram á ein skipaðan hátt**

Ráðgevingarfyritøkan Hugin spf. bjóðar nú føroyskum fyritøkum seminar í nýskapan.

Endamálið við seminarinum er
- at hjálpa fyritøkum at arbeiða við nýskapan á ein meira skipaðan hátt
- at fáa hugskot fram um nýskapan, ið eru í fyritøkuni júst nú
- at tryggja fyritøkuni at gerast betri at arbeiða við nýskapan á ein varandi hátt
- at koma frá hugskoti til íverksetan við ítøkiligum handlingsætlanum

Dentur verður lagdur á nýskapan innan fyri arbeiðsgongdir, tænastur, vørur og annað, ið er grundað á núverandi og komandi tørv hjá kundum ella brúkarum. Hesin hátturin at arbeiða við nýskapan – við stigvísari ella meira víðfevnandi broyting og tillaging av arbeiðsgongdum, vørum og tænastum – hevur víst seg at vera tann nýskapanin, ið gevur fyritøkunum størst búskaparligan vøkstur.

Tað ger ongan mun, um fyritøkan er privat ella almenn. Organisatiónin hevur altíð fyrimunir av at arbeiða við at nýskapa sínar arbeiðsgongdir, tænastur og vørur.

Nýskapan er eitt innanhýsis seminar, og tað er gjørt fyri at snikka saman eitt tiltak, ið er bygt á tørvin hjá tí einstøku fyritøkuni. Hetta er samstundis trygdin fyri, at fyritøkan kann arbeiða miðvíst við egnari nýskapan og seta hugskotini í verk.

Vilt tú hoyra, hvussu vit kunnu seta saman eitt nýskapanarseminar til tína fyritøku, ert tú vælkomin at venda tær til Hugin.

hugin
Spf. Hugin - ráðgevingarfyritøka, Heiðatún 3, FO-160 Argir, hugin@hugin.fo, www.hugin.fo